

*– Eg eri ofta frustreraður, áðrenn eg skal út at spæla. Eg kenni tað, sum eg eri ikki nóg tendraður, og at framførslan tí ikki fer at nytta nakað. Men tá eg so standi á pallinum, eri eg til reiðar, sigur Hanus G. Johansen*

MYND: ÁLVUR HARALDSEN

at spæla nógv í Jazzklubbanum, ið helt til í veitsluhøllini í Havnar Klubba. Har fekk hann góðan íblástur og víðkaði sær tónleikaliga sjónarringin. Bæði Bob Dylan, Donovan og Leonard Cohen vóru á skránni í Jazzklubbanum, og nú fór hann eisini at seta løg til føroyskar yrkingar.

– Ívar Bærentsen eigur helst æruna av, at eg fór at seta løg til føroyskar yrkingar. Hann gjørdi nógv við sovorðið, og fyrsti sangurin, eg sang á eini plátu, var »Pøsta verð« hjá honum. Tað var í 1978. Fyrsta yrkingin, eg sjálvur setti lag til og spældi inn, var »Droymandi teskar áin« hjá Bernhardi Brim. Eg gjørdi nógv løg síðst í 70'unum og fyrst í 80'unum, og flestu løgini á »Gaman og álvara« eru frá teirri tíðini, sigur Hanus.

### Í ørviti av Ommu Ludvík

Hanus kom eisini nógv í Perluna, áðrenn hon varð rivin niður, og har spældi hann fyrstu ferð alment saman við Steintóri Rasmussen í 1980. Tá teir báðir skrivaðu sangirnar upp, sum teir skuldu spæla, løgdu teir til merkis, at allir sangirnir hjá Steintóri vóru í dur, meðan sangirnir hjá Hanusi vóru í moll. Og tað eru sangirnir hjá Hanusi sum oftast.

– Mær dámar nógv betur moll, tí tað passar betur til mín, sigur hann og gáar so eftir, at »Droymandi teskar áin,« »Áh, kundi á tíðarhavi« og »Fljóðið bjarta« hóast alt eru í dur.

Í 1981 fór hann aftur av landinum. Nú gekk leiðin til Struer at búgva á vertshúsinum Carlsen's Hotel. Har arbeiddi hann og ballaðist. Billiardspælari gjørdist hann góður, tí skuldi hann gera sær vónir um at vinna nakrar øl, mátti hann vinna á hinum úrmælingunum við grøna borðið. Meðan hann var í Struer, ringdi Steintór Rasmussen og bað hann koma heim at spæla eina plátu inn. Hetta var í desember 1982.

Plátan kom ikki í lag tá, men Hanus varð verandi í Føroyum og kom aftur í samband við tónleikararnar í Havn. Kristian Blak og Jóhannus á Rógvu Joensen sendu boð eftir honum at

> **Mær dámar nógv betur moll, tí tað hóskar betur til mín**

spæla og syngja á plátum, og í 1983 sang hann sangin »Omma Ludvík« á barnaplátuni »Nósi,« sum Kristian Blak framleiddi. Sangurin gjørdist ein sonn landaplága.

– »Omma Ludvík« er størsta hitt í Føroyum nakrantíð. Tað var heilt merkiligt, sum fólk uppførdu seg. Vaksnir menn og konur við barnavognum róptu púra ósmæðin Omma Ludvík eftir mær á gøtuni. Kanska komst tað av, at sangurin var so positivur. Upprunaliga sótu eg og kona Kristian, Sharon, við eini yrking, sum segði, at Omma Ludvík var tjúkk og feit og líktist eini ær. Sovorðið negativt fjas tímdi eg ikki at syngja, so vit gjørdu hana í skundi stóra, sterka og glaða, sigur Hanus.

### Tað stóra gjøgnumbrotið

Vinmenninir í Klaksvík vóru nú til reiðar at fara í upptøkuhølini, og í 1984 kom »Saman við tær« hjá Frændum út, har Hanus m.a. sang við á landapláguni »Hundurin brúni.« Árið eftir fóru hann og Steintór Rasmussen á norðurlendskt vísutreff í Íslandi. Einir 100 vísusangarar hittust har at spæla saman í eina viku, og Hanus hevur síðan havt gott samband við vísuumhvørvið í Norðurlondum.

Meðan Frændur góvu út næstu plátuna í 1986, har Hanus eisini var við, plágaðu fólk hann áhaldandi um at fara at spæla okkurt inn í egnum navni. Tann 18. november í 1988, á 90 ára føðingardegnum hjá Pól F., kom so »Gaman og álvara« í plátuhandlarnar. Útgávukonsert var í Norðurlandahúsinum, og Hanus varð fullkomiliga tikin á bóli, tá hann steig á pallin.

– Har var stappað við fólki, eini 700 fólk, sum sótu og stóðu allastaðni runt í salinum. Tað var fantastiskt. Vit gjørdu plátuna í august sama ár, tá Jazzfestivalurin var í Havn. Jørgen Emborg og eg stóðu fyri at leggja grundirnar inn, meðan Jóhannus á Rógvu tók upp, og so fingu vit fleiri góðar tónleikarar á festivalinum at spæla við. Jørgen Emborg spældi klaver, Anders Hagberg spældi bass, og Bjarne Rostvold spældi trummur. Tað var øgiliga gott hjá teimum, sigur Hanus.

»Gaman og álvara« var plátan, sum festi vísusangaran Hanus G. Johansen í tilvitanina hjá hvørjum einasta føroyingi. Í 1985 hevði hann á »Ung 85« sungið sangin »Átjan,« ið beinanvegin gjørdist fólkaogn, men nú stóð ein heil plátа í handlunum við Hanusi og Pól F., og tað dámdi fólki. Í 2008 kom »Gaman og álvara« út sum fløga, og hetta vísir, at plátan enn er nógv eftirspurd og helst fer at selja leingi aftrat.

Í dag fyllir góði, gamli Hanus so 60 ár. Í hesum sambandi kemur út EP við fimm løgum til yrkingar eftir Hans Jacob Glerfoss. Í heyst kemur so næsta fløgan við løgum til yrkingar hjá Poul F.

Hanus spælir framvegis nógv alment, eisini á føðingardegnum í Norðurlandahúsinum í dag, og hvørja ferð tekur hann uppgávuna í størsta álvara.

– Eg eri ofta frustreraður, áðrenn eg skal út at spæla. Eg kenni tað, sum eg eri ikki nóg tendraður, og at framførslan tí ikki fer at nytta nakað. Men tá eg so standi á pallinum, eri eg til reiðar, sigur hann.

### FAKTA HANUS

**Navn:** Hanus Gærdum Johansen
**Føddur:** 18. juni 1950
**Útgávur:** »Gaman og álvara« sum LP og band 1988, »Bouquet,« saman við Aldubáruni 2000, »Frá Leddiken« 2006, »Gaman og álvara« sum fløga 2008, »Eitt blað eg á kann skriva« 2010